**bóka ummælið**

mortan@hamrabyrgi.com

# Øl-bók til fólkið




Ein av størstu øl-fjepparum í Danmark, Carsten Berthelsen, hevur skrivað sera forvitnisliga bók um øl, "Øl for enhver smag".

Talan er næstan um eina grundbók fyri tann, ið vil vita meira um henda fantastiska drykk. Berthelsen tekur okkum við á ferð inn í allar krókar av øl-framleiðslu. Bæði søguliga, vísindaliga, politiskt og samfelagsliga.

Bókin tekur støði í danska samfelagið og fjølbroyttnu øl-søguna. Vit hoyra um gomlu bryggjararnar, urtagarðar í munkakleystrum í miðøldini. Um øl í fjareystri og øl í Norðanlondum.

Bókin nevnir eisini dømir um øl-sløg, ið tann nýkosni øl-fjepparin eigur at royna. Øl er sera fjølbroytt og vit eiga at unna okkum at læra at kenna so nógv sløg sum gjørligt. So duga vit betur at meta um dygdir.

"Heimsins besta øl", Trappist Westvleteren Massieve Ale frá St. Sixtus-kleystrinum í Belgia verður sjálvandi eisini umrøtt.

Øl-skúlin greiðir okkum frá hvat 'ale' er og hvat 'weissbier' merkir. Kynstrið at smakka øl verður lýst út í æsir. Hvussu allir sansir skula nýtast.

At enda í bókini er frálík uppskot til ein góðan frokost við úrvaldum salgi av øli.

Hetta er frálík bók til tann, ið skal keypa sína fyrstu bók um øl.

Øl for enhver smag, Carsten Berthelsen, Lindhardt og Ringhof, 217 blaðsíðir, innbundin, uml. kr. 276 í føroysku bókahandlunum.









**Mortan í Hamrabyrgi umrøður nýggjar bøkur um mat og drekka**







